B36-Metalurgs 1-3(1-2):

# Eydnan var ikki við B36

**Eftir eina ræðuliga byrjan upp á dystin kom B36 veruliga fyri seg í UEFA-Cup dystinum ímóti lettiska Metalurgs, og við eitt sindur av hepni var framvegis spenningur undan returdystinum**

UEFA-CUP
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*B36 royndi at stríðast, og við eitt sindur av hepni – og meira dómaratekki – kundu teir eisini fingið meira burturúr*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað ráddi um hjá áskoðarunum til dystin millum B36 og Metalurgs á Tórsvølli hóskvøldið, at teir komu til tíðina. Teir áskoðarar, ið vóru eitt sindur seinkaðir til dystin, sóu allarhelst ikki tvey mál, tí lettiska liðið gjørdi skjótt av.

### Fýra dýrir minuttir

Tað var ikki frítt, at fólk ikki trúðu sínum egnu eygum, tá ið Metalurgs fekk fyrsta málið. Dysturin var settur í gongd, og tá ið bólturin verður sendur oman í brotsteigin hjá B36, fær verjan hjá havnarfelagnum ikki sparkað bóltin nóg væl burtur. Ein letti fangar bóltin stutt uttan fyri brotsteigin hjá B36, og eftir eitt sindur av trunkaspæli, endar bólturin hjá Gvyldis, sum sendir hann í netið, og so var 1-0, og einans 24 sekund vóru farin av dystinum!

Hetta var ikki júst tað, sum heimaliðið hevði ætlað, og fyri at gera ilt verri, gekk tað aftur galið bert tríggjar minuttir seinni. Ein tann mest eyðsýndi leikarin á liðnum hjá Metalurgs, Viktor Dobrecovs, slapp at renna allan vegin oman ímóti brotsteiginum hjá B36, uttan at nakar verjuleikari leyp í hann. Komin áraka brotsteigarmarkið meddaði Dobrecovs til, og bólturin sat í netinum aftan fyri Trónd Vatnhamar. 2-0 til lettiska liðið, og klokkan vísti, at einans tríggir minuttir og fimti sekund vóru leikt av dystinum.

Hetta var tann ringasta byrjanin upp á dystin, ið hugsast kundi. Tó eiga leikararnir hjá B36 rós uppiborið, tí at teir fullu ikki í fátt av støðuni, og so hvørt sum fyrri hálvleikur leið, kom heimaliðið meiri og meiri við í dystin. Spælið hjá B36 hekk betur saman, og menn byrjaðu at finna hvønn annan á vøllinum. Enn vantaði tó tann síðsta avleveringin, sum kundi skapa veruligar málmøguleikar, men sjálvsálitið hjá heimaliðnum vaks, og tað sást týðuligani aftur úti á vøllinum.

### Ivasamar dómaraavgerðir

Vertirnir úr Havn høvdu sína fyrstu veruligu roynd upp á lettiska málið, tá ið góðir 20 minuttir vóru leiktir. Tað var liðskiparin, John Petersen, sum royndi seg við einum skoti úr 18 metrum, sum lettiski málmaðurin tó hevði fult tamarhald á. Tíggju minuttir seinni var nær við, at Metalurgs økti um leiðsluna, men Tróndur bjargaði væl, tá ið skallað var eftir hornaspark.

Tá ið 33 minuttir vóru leiktir av fyrra hálvleiki, vildu leikararnir hjá B36 hava brotsspark. Ein bóltur kom inn í brotsteigin hjá Metalurgs, og John Petersen fór um koll. Tað líktist einum upplagdum brotssparki, men írski dómarin lat ikki við seg koma. Dómarin lat heldur ikki við seg koma fimm minuttir fyri steðgin, tá ið Bergur Midjord slapp inn um verjuna hjá lettunum. Komin framvið seinasta verjuleikaranum sást skilliga, at Bergur bleiv togaður niður av verjuleikaranum, men ístaðin gav írski dómarin Bergi gula kortið fyri film. Her hevði heimaliðið uppiborið betur.

Bergur var aftur í fokus ein minutt fyri steðgin, men hesaferð gekst betur. B36 fekk innkast í vinstru síðu, og John Petersen gjørdi skjótt av og kastaði frameftir. Bergur fekk bóltin inni í brotsteiginum hjá lettunum, og hann snýtti ein verjuleikara, áðrenn hann skeyt bóltin í netið umvegis nærmastu stong. So var 1-2, og málið hjá B36 kom í best hugsandi løtu.

### B36 trýsti

Eftir steðgin royndu vertirnir úr B36 at leggja trýst á lettiska málið, og tað eydnaðist teimum eisini í ein ávísan mun. Lettarnir vóru tó ikki heilt vandaleysir, og millum annað noyddist Ronnie Samuelsen at bjarga á sjálvari málstrikuni bara fýra minuttir eftir steðgin.

Hóast fleiri atsóknir á lettiska málið, bragdaði tað ikki hjá B36, og ístaðin vóru tað gestirnir úr Metalurgs, ið enn einaferð komu á máltalvuna. Tað sá út til, at Bergur Midjord bleiv rendur um koll áraka brotsteigarmarkið hjá Metalurgs, men enn einaferð lat írski dómarin ikki við seg koma, og ístaðin fóru lettar í skjótálop. Viktor Dobracovs bleiv spældur fríur innan fyri verjuna hjá B36, og tá ið linjuverjin, sum hevði flaggið uppi, valdi at koyra tað niður aftur, var lagamanni hjá Dobracovs at senda framvið Tróndi ímálinum, og lettar vóru nú á odda 3-1, og tað var ikki í tráð við dystargongdina. Heimaliðið var sjálvsagt ikki glaðir fyri avgerðina og fleiri aðrar við, og tað skal sigast, at sjáldan hevur eitt so vánaligt avrik verið at sæð av einum altjóða dómara á einum føroyskum vølli. Írski dómarin var alt annað enn heimadómari, og leikararnir hjá B36 mangan grein í sínum máli, tá ið teir kendu seg snýttar.

Seinastu løtuna av dystinum fór gassið fullkomiliga av ballónini, og leikferðin í dystinum minkaði munandi. Bæði liðini tóktust bara vilja hava tíðina at ganga, og tí komu ikki fleiri mál í dystinum, sum B36 við eitt sindur av hepni og einum betri dómara kundi havt fingið væl meiri burturúr.

# Mistøk kosta

**Liðskiparin hjá B36, John Petersen, segði eftir dystin hóskvøldið, at hevði tað ikki verið fyri mistøkini tíðliga i dystinum, hevði alt verið opið undan seinna dystinum í Letlandi**

DÝR MISTØK
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*John Petersen ivast ikki í, at B36 kann fáa eitt gott úrslit, tú útidysturin er á skránni ólavsøkudag*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Frá sínum royndum í altjóða dystum veit liðskiparin hjá B36, John Petersen, at gerst tú mistøk í slíkum dystum, so verða tey revsað beinan vegin, og tað var sjón fyri søgn hóskvøldið.

### Ikki ræðandi mótstøða

Eftir dystin helt John, at teir fyrstu minuttirnir av dystinum kosta dýrt. Spurdur, hvat tað er, sum hendur, svarar John, at teir hildu seg verða klárar at fara undir dystin, men tað vóru teir tíverri ikki fyrstu løtuna, og tað kostaði dýrt. Landsliðsleikarin heldur, at høvdu lettarnir ikki fingið tey bæði skjótu málini tíðliga í dystinum, er tað væl møguligt, at alt hevði verið opið undan dystinum í Letlandi, men sum nú er, trýr hann ikki uppá, at tað fer at bera til hjá B36. Hinvegin ivast John ikki í, at teir kunnu fáa eitt gott úrslit á útivølli, tí mótstøðuliðið var als ikki ræðandi, hóast talan var um eitt gott lið, sigur hann.

John Petersen helt lítið um dømingina, sum hann helt verða undir alt lágmark, og eitt tað vánaligasta. ið hann hevur sæð í sínum mongu altjóða dystum bæði fyri landsliðið og GÍ og B36.

Um sjálvan dystin sigur John eisini, at eftir hansara tykki spældi B36 fult upp við lettarnar stóran part av dystinum, men tað var rættuliga tungt í fyrra hálvleiki, beint eftir at tey bæði skjótu málini vóru komin.

### FAKTA

**B36-Metalurgs 1-3(1-2)**
0-1 Gvyldis 1.
0-2 Viktor Dobrecovs 4.
1-2 Bergur Midjord 44.
1-3 Viktor Dobrecovs 63.
**B36:** Tróndur Vatnhamar - Allan Mørkøre, Pól Thorsteinsson, Johannes Joensen, Arnbjørn Danielsen - Kenneth Jacobsen(60. Bárður Mortansson), Niels Joensen, Ronnie Samuelsen, Alex Jose dos Santos(85. Jens Kr. Hansen) - Bergur Midjord(78. Egil á Bø), John Petersen liðsk.
**Áskoðarar:** 640



B68-FK Ventspils 0-3 (0-2):

# Alt er sum tað plagar at vera

**Persónlig mistøk hjá B68 vórðu dyggiliga sektað, og tá ið toftamenn spældu seg til møguleikar, vóru marginalirnir ikki á teirra síðu**

UEFA CUP
*Jóannes Hansen*



*Toftamenn stríddust manniliga, og stórir glottar vóru at hóma í spælinum, sammett við landskappingina í ár. Men nóg mikið til stig var tað tó ikki hesaferð*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tað gekk, sum tað plagar at gera, tá ið føroysk feløg royna seg í Europa Cup. Hóast B68 er botnlið í heimligu landskappingini, so stóðu teir seg hvørki verri ella betri, enn miðal avrikini plagar at vera hjá føroyskum feløgum.

FK Ventspils úr Letlandi vísti seg at vera betri fyri enn B68. Teir vóru kropsliga væl fyri, teir vóru skjótir, og teir tóktust eisini hava góðan bóltførleika.

Hvussu nógv betri teir vóru enn heimaliðið fekst eingin staðfesting av í dýrdarveðrinum. Tá ið fyrra umfarið var hálvrunnið høvdu teir tvær ferðir sektað stór persónlig mistøk hjá heimaliðnum, og síðani var spurningurin bara, hvussu stórur sigurin skuldi verða.

Tað var kanska ivasamt, um gestirnir løgdu alt fyri. Men tað var undrunarvert, at teir við tryggari leiðslu á útivølli fingu fleiri gul kort, sum kunnu kosta, um teir koma longri í kappingini.

Ventspils spældi seg til fleiri málmøguleikar, men teir fingu bara eitt mál í 2. hálvleiki. Ofta vóru teir óneyvir í skotroyndunum, og Jazek Prxybylski í B68 málinum hevði fleiri góðar bjargingar.

### Málini

Stóri maðurin hjá Ventspils var miðframherjin Vits Rimkus, sum skoraði øll trý málini. Tað fyrsta fekk hann, tá ið eitt kort var farið. B68 misti í uppspæli í vinstru. Tað endaði við letlendskum frísparki við baklinjuna, sum fekk loyvi at sigla mitt innfyri málið, har maðurin við góða máltevinum var púra blankur, tá ið hann setti krúllin undir bóltin.

Átta minuttir seinni var hann aftur upp á spæl. Hesa ferð hekk verjuspælarin hjá B68 í vinstru eftir, tá ið teir royndu at seta rangstøðufellu. Vits kom einsamallur úr vinstru og setti framvið málverjanum.

Triðja málið kom, tá ið 20 minuttir vóru farnir av 2. hálvleiki. Málið áttu fleiri av verjuspælarunum og málverjin sín lut í. Tað endaði við kiksaðari afturlegging, sum Vits segði ikki møguleikan frá sær, hann kom ímillum og setti framvið málverjanum.

### B68 glottar

Toftamenn vóru ikki púra fyri nothing. Øssur Hansen vísti ábyrgd og hevði sjálvsálit. Áðrenn nakað mál var komið, var um reppið, at hann legði B68 framum. Langskotið úr vinstru var gott, men málverjin fekk bent tí til horna.

Í síðstu sekundunum í 1. hálvleiki var um reppið, at Jóhan Petur Poulsen fekk mál. Eftir skjótt B68 álop hevði hann sjálvsálit at fara framvið verjuspælara og royna ímóti málinum, men tíverri small skotið í stólpan.

Brasiliumaðurin Andersson, sum í spælistíli minnir nógv um Álvaro hjá FCK, tykist megna nógv einsamallur. Tíðliga í 2. hálvleiki gjørdist hann leysur eftir framspæling frá Øssuri Hansen, men málverjin kom út og blokeraði.

B68 fekk einki mál, og tað er ivasamt, um teir fara at fáa nakað, tá ið teir á Ólavsøku skulu royna seg í Letlandi. Men teir vístu hóskvøldið, at teir hava møguleikan.



*Vits Rimkus gjørdist stóra hetjan hjá lettiska liðnum. Hann gjørdi øll málini í dystinum á Svangaskarði*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

### FAKTA

**B68-FK Ventspils 0-3 (0-2)**
Hósdagin 15. juli 2004, kl. 19.00 á Svangaskarði.
Fyrsta innleiðandi umfarið í UEFA Cup, fyrri dystur. 470 áskoðarar.
**Dómarabólkur úr Skotlandi:** Iain Brines, Jim Lyon, Lawrence Kerrigan og Jamie Downie
**UEFA umboð úr Finnlandi:** Esa Furuholm
**Dómaraeygleiðari úrLuksemborg:** Charles Schaack
0-1: Vits Rimkus 15.
0-2: Vits Rimkus 23.
0-3: Vits Rimkus 64.
**B68:** 1. Jazek Przybylski — 4. Oleif Joensen, 2. Herbert í Lon Jacobsen, 17. Kári Sigvardsen, 15. John Heri Dam — 10. Stanislav Stankov, 14. Eyðstein Skipanes, 7. Øssur Hansen, liðformaður — 18. Kristian Anton Andreassen, 9. Casthillio Anderson, 11. Jóhan Petur Poulsen (8. Ove Magnussen, 78.)
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 12. Fróði Jensen, 3. Kristian Poulsen, 6. Jóhan Dávur Højgaard, 16. Ronnie Svalbard
**Venjari:** Edmund Jacobsen
**Málmansvenjari:** Eyðun Petersen
**Liðleiðari:** Oddmar Andreassen
**Fysioterapeutur:** Øssur Steinhólm
**Gult kort:** Stanislav Stankov 14., Herbert í Lon Jacobsen 69.
**FK Ventspils:** 1. Deniss Romanovs — 6. Vladimirs Zavdoronkovs, 4. Tomas Hejdusek, 12. Maris Snirnovs, 18. Igors Korablovs, liðformaður — 19. Andrey Agafonov (11. Aleksandar Gruber, 46.), 7. Alexsandr Rehviashvili, 15. Igoris Stukalinas — 14. Jiri Krohmer (24. Branislav Jasurek, 67.), 9. Vits Rimkus (10. Grazvydas Mikulenas, 78.), 22. Deimantas Bicka
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 26. Naksims Uvarenko, 2. Alekseys Soleicuks, 21. Viktors Lukasevics, 8. Deniss Kacanovs
**Gult kort:** Andrey Agafonov, 40., Vladimirs Zavdoronkovs, 44., Igoris Stukalinas, 60., Vits Rimkus, 64.
**Venjari:** Saulius Sirnelis
**Hjálparvenjarar:** SauliusCekanavicius og Stanislav Seman
**Liðleiðari:** Andreys Lapsa
**Lækni:** Boriss Lavrenovs
**Massørur:** Olegs Nazarovs

## Heimsins kvikasta tikin fyri doping

Torri Edwards, sum í løtuni er heimsins kvikasta kvinna á 100 metrum, er nú tikin fyri doping. Hon váttaði sjálv fyri amerikanskum miðlum, at hon er tikin fyri nýtslu av einum evni, sum hon sjálv ikki veit um, at hon hevur tikið. Doping-gølan kann hava við sær, at amerikanska Torri Edwards ikki verður við til OL í Athen í næstum.

## Frei fekk leikbann í tríggjar dagar

Alexander Frei, sveisiskur landsliðsleikari í fótbólti, var í vikuni dømdur tríggjar dagar leikbann av UEFA, tí at hann í dysti ímóti Onglandi undir EM-endaspælinum í Portugal, spýtti eftir enska landsliðsleikaranum Steven Gerrard. Revsingin hjá Frei er júst tann sama, sum italski Francesco Totti fekk fyri at spýta á danska Christian Poulsen í somu kapping.

## Shaquille O´Neal rýmir úr Lakers

Ein av heimsins bestu kurvabóltsleikarum, Shaquille O´Neal, skiftir nú felag. Eftir at hava verið átta ár í sigursvanda LA Lakers, fer 32 ára gamli og 216 sentimetrar høgi O´Neal at leika fyri Miami Heat. Talan er um ein býtishandil millum Miami og Lakers. Shaquille O´Neal ella Shaq, sum hann eisini verður nevndur, fer til Miami, sum afturfyri sendir tríggjar spælarar hinvegin.